TING-HELLAN

# Valið, ið ikki var

**Fólkatingsvalið var av fyri góðari viku síðani, og sjógvurin hevur lagt seg. Eftir er ein tóm kensla, ein kensla, sum longu gjørdi vart við seg undir tí stutta valstríðnum, sum var. Tí hvat snúði hetta val seg í grundini um? Um politikk? Ja, kanska í teirri merkingini, at politisku flokkarnir vilja vera, og mugu tí eisini vera har, tá ið eitthvørt valstríð er, hóast teir sum í hesum føri duga illa at siga frá, hvat ið teir vilja fremja av veruligum politikki, fáa teir umboð á hetta fremmanda ting. Og hóast valstríðið var óvanliga dovið, so fóru næstan tríggir fjórðingar á val. Eitt rættuliga høgt tal, so veljarin – ella ið hvussu er summir - halda tað hava týdning at seta sín kross eisini á fólkatingsvali.**

TINGHELLUKRONIKK
*Jógvan Mørkøre*



### Úrslitið

Tað kenna vit. Tjóðveldisflokkurin varð størsti flokkur fyri fyrstu ferð á einum fólkatingsvali. Hann hevur vunnið sær umboðan tríggjar ferðir áður, men tá hevur tað verið á øðrum plássi. Fólkaflokkurin varð næst størstur og hevur nú vunnið sær umboðan á Danatingi tilsamans 11 ferðir. Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin, sum annars liggja fremstir í hesari kapping við ávikavíst 15 og 16 umboðanum síðani 1948, vórðu ov stuttir hesuferð. Tað er merkisvert, at fyri fyrstu ferð í heimastýrissøguni er tað komið fyri, at hvørgin av teimum stóru heimastýrisflokkunum hevur fingið umboðan á fólkatingsvali. Tað hevur annars verið teirra beiti heldur enn beitið hjá sjálvstýrisflokkunum, sum í styttri og longri tíðarskeið vendu hesum vali bakið. Hesuferð hendi so tað, at stóru flokkarnir á sjálvstýrisveinginum struku avstað við báðum fólkatingsumboðunum. Fyri fyrstu ferð.

### Luttøka

Ein grundleggjandi orsøk til, at tað kundi ganga, sum tað gekk, finna vit í tí, at í dag fæst stórt sæð eins stórur partur av sjálvstýrisveljarunum á fólkatingsval eins og av heimastýrisveljarunum. Tað hevur ikki altíð verið so. Serliga tykist tað hava verið ein trupulleiki hjá Tjóðveldisflokkinum, tá ið rekast skuldi. Men tað er so líðandi broytt. Frá eini valluttøku um tey 55 prosentini, so er hon vaksin stútt, síðani allir 4 teir stóru flokkarnir, Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin fóru at bjóða seg fram miðskeiðis í sjeytiárunum. Ein veljarakanning í sambandi við fólkatingsvalið í 2001 vísti, at veljararnir hjá øllum flokkum løgdu dent á týdningin at hava umboð á Fólkatingi. – Eisini um ríkisrættastøðan broyttist!

Alt bendir á, at í dag liggur valluttøkan eini tjúgu prosent hægri, so hon nærkast valluttøkuni á løgtingsvali, sum liggur um 85-90 %. Ivaleyst er tað serliga Tjóðveldisflokkurin, sum hevur havt fyrimun av hesi broyting. Samstundis inniber tað, at kappingin millum fýra teir størstu alt meira minnir um kappingina teirra millum á løgtingsvali.

Á hesum valinum varð luttøkan kortini lakari enn á undanfarna fólkatingsvali í 2001, tá ið hon setti met við 80 prosentum. Men hon kann ikki sigast at vera lág ella vánalig, tí 72,7 % er hóast alt eitt høgt tal á fólkatingsvali. Ja, í hesum føri tað næst hægsta í eftirkrígstíð.

Men ein afturgongd upp á góð sjey prosent er ein afturgongd, ið sæst aftur, og hesuferð tykist tað serliga at hava rakt teir báðar stóru heimastýrisflokkarnar, sum hava havt trupult við at fingið sínar veljarar á val.

Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin gingu báðir aftur, ikki bert prosentvíst, men eisini í reinum atkvøðutali. Sambandsflokkurin mest – útvið tvey túsund atkvøður av gott sjey! Javnaðarflokkurin gott hálvt túsund atkvøður, men í hansara føri verður skorið nærri at beini, tí hann hevði longu á undanfarna vali mist nakað av atkvøðum til fyrst og fremst Sambandsflokkin og Tjóðveldisflokkin.

Tjóðveldisflokkurin gekk fram í prosentum, hóast hann fór hálvt triðja hundrað aftur í atkvøðum. Meðan hinir tríggir, Fólkaflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin vóru teir, ið gingu fram bæði í prosentum og atkvøðum.

### Raksturin

Nú vita vit ikki, hvørjar flytingar fóru fram millum flokkarnar á hesum valinum. Bert ein veljarakanning varð gjørd hesuferð. Tað sigur eitt sindur um áhugan hjá fjølmiðlunum fyri valinum. Seinast fólkatingsval var í 2001 vórðu 4 gjørdar innan fyri seinastu vikuna av valstríðnum.

Hesuferð varð so bert ein gjørd av Gallup. Tíverri var hon heldur pírin við upplýsingum so sum t.d. flytingar millum flokkar. So vit mugu aftur í eldri kanningar og so gita okkum til, hvat hendi hesuferð.

Í sambandi við valið í 2001 varð ein kanning gjørd, ið vísti, at umleið ein fjórðingur av teimum veljarum, sum høvdu atkvøtt Fólkaflokkin á fólkatingsvalinum høvdu í hyggju at lata atkvøðuna fara til Sambandsflokkin ella Tjóð-veldisflokkin. Umleið ein helvt í part, 11-13 %.

Hjá Javnaðarflokkinum vóru tað um umleið 15 %, sum vóru á veg til Sambandsflokkin ella Tjóðveldisflokkin. Eini 7-8 % til hvønn.

Út frá hesum – og við kanningini hjá Gallup í huga, ið gav hesum báðum flokkum, ið bløddu seinast, framgongd – so var væntandi, at tað fór at gangast teimum væl. Har vóru veljarar, ið tað átti at borið til at fingið aftur.

Tað gekst bert Fólkaflokkinum væl og ikki Javnaðarflokkinum. So alt bendir á, at tað ikki bert miseydnaðist Javnaðarflokkinum at fáa fyrrverandi veljarar aftur frá øðrum flokkum, men at fleiri veljarar, ið lótu honum sína atkvøðu í 2001, valdu ikki at fara á val og stuðla honum hesuferð. Tað má geva honum okkurt at hugsa um. Hvat er tað, veljararnir vilja siga við hesum? – Og hvørjir eru hesir veljarar?

Í Suðuroy – og serliga í Vági – fekk Javnaðarflokkurin ein dyggan bakkaláara. Tað undrar ikki oman á allan gangin um ætlaðu flytingina av miðnámsskúlanum. Men tað kann so ikki vera øll frágreiðingin. Veljarar eru eisini setstir aftur aðrastaðni í landinum. Spurningurin er so, um tað er sami bólkur, sum vendi honum bakið, aftaná at hann hevði sitið í samgongu 1990-1994, ið nú roynir at geva flokkinum eina ávaring. Tá var tað serliga tey tímaløntu, ið vendu honum bakið, og stovnaðu Verkamannafylkingina, tí tey mettu, at m.a. Javnaðarflokkurin hevði svikið sum arbeiðaraflokkur. Tað skerst ikki burtur, at tað var váðið hjá Javnaðarflokkinum at leggja saman við tveir borgarligar flokkar, og tað hevur heldur ikki skortað upp á mótmæli frá fakfeløgum umboðandi henda bólk, tá ið samgongan framdi fyrsta part av skattalættingarpolitikkinum.

Fólkaflokkurin fór fram og tók nakað av tí mista frá 2001-valinum inn aftur. Serliga varð

